## DAGSINS MEINING

# Hvørji eru málini?

Áhugavert er at lesa búskaparfrágreiðingina fyri 2002. Sum altíð er tað ógvuliga áhugavert at síggja, hvat her verður sagt, og ikki ber til at hava eitt skilagott orðaskifti um búskaparstøðu Føroya, uttan hetta íkastið, har serfrøðin, ella í hvussu so er partur av henni, ger sína meting av støðuni.

Eitt er serfrøðin, og eitt annað er, hvat politikarnir vilja. Tann politiska diskussiónin um, hvat man vil í føroyska samfelagnum eigur at hyggja at, hvørji mál, vit eiga at seta okkum sum fólk. Skal málið verða so høg framleiðsla pr íbúgva sum møguligt? Kanska hetta burdi verið framleiðsla pr arbeiðstíma. Skal málið verða eingin inflatión? Skal málið verða fjøltáttan av búskapinum? Her raka vit við eitt annað, ið verður tikið upp í frágreiðingina fra Búskaparráðnum. Er tað landsins uppgáva ígjøgnum vinnupolitisk tiltøk, at skunda undir ávísar vinnur? Hví júst KT vinnuna, sum Vinnumálastýrið hevur fokuserað uppá í seinastini? Er hetta politisk bending av marknaðinum?

Tað, ið treingir til er eitt vinstra høgra orðaskifti um generel mál viðvíkjandi búskapar- og vinnupolitkki. Skal so høgur búskaparvøkstur sum gjørligt gerast eitt mál í sjálvum sær? Kundi man ikki havt ein eitt sindur lægri búskaparvøkstur við einum øðrvísi arbeiðsmarknaði? Tað eru tey, ið halda, at tað er nógv fyri, at vit ár eftir ár erpa okkum av einum høgum búskaparvøkstri, men klára ikki so mikið sum at hava ansing til øll okkara gomlu. Lat okkum fáa eitt ideologiskt politiskt kjak, óheft av tendensiøsum ynskitankum, sum at marknaðurin klárar at regulera seg sjálvan, tí tað klárar hann ikki altíð. Landsstýrismaðurin í Vinnumálum hevur ivaleyst eisini viðgingið hetta, tá hann brúkar landisins pening uppá stimbran av ávísum vinnum.

Eitt annað orðaskifti kundi verið um protektionismu. Føroyskur vinnupolitikkur er merktur av protektionismu, men ikki ført tú nógvar borgarligar kreftir at viðganga hetta, tí tað er jú ikki í tráð við naiva heimsbílætið, har fría alheimskappingin klárar alt av sær sjálvum. Er ikki tíð uppá, at vit fáa skápsprotektionistarnir í Fólkaflokkinum at viðganga síni mál?

Vit hava ein blandingsbúsksap og ganga flestu flokkar inn fyri hesum, kanska við undantak av Fólkaflokkinum. Hvat teir so gera í praksis er nakað annað. Lat okkum fáa eitt vinstra høgra orðaskfti í tinginum um málini fyri Føroya land sum skjótast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Alment og privat altíð og allastaðni knýtt hvørt at øðrum

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



Privata vinnulívið skapir grundleggjandi inntøkurnar til at gjalda fyri almennu útreiðslurnar. - Frælsa vinnan hevur fyri neyðini at ganga undan í effekektiviteti.

Búskapar- og samfelagsfrøðingar hava saman við ávísum politikarum seinnu árini gjørt nógv burtur úr, at skal verða liviligt, er neyðugt greitt at skilja millum alment og privat. Hetta verður eisini nevnt bæði í frágreiðingini frá Búskaparráðnum og í løgmansrøðuni 2002.

Grundarlagið undir samfelagnum er privatu inntøkurnar sum skulu gjalda almennu útreiðslurnar Í øðrum lagi eru tað privat/almennu inntøkurnar, ið gjalda fyri fleiri almennar útreiðslur. Í triðja føri privatu/almennu inntøkugjøldini fyri brúks- og tænastuvørur (MVG o.a.) til fleiri hækkandi útreiðslur. Í fjórða viðfangi koma almennar inntøkur fyri tænastur frá almennum stovnum, sum skriva rokningar fyri gjørd arbeiði fyri lógásettar tænastur í privatum fyritøkum.

Soleiðis kundi verið hildið fram. Onki alment uttan privat. Ongi heilsu- og trivnaðarmál uttan framleiðslu, og ongar tænastur uttan primervinnan hevur góðar sømdir. Hetta hongur saman.

**Borgarligir fyrimunirnir**

Hóast torført er at finna samanbering av Føroyum og Kina, ber til at hyggja at søguni hjá hesum risa landi, har privata fyritakssemi ikki fekk sømdir í meiri enn 50 ár. Fólkið gjørdist ómotiverað - "eitt deytt tól".

Seinastu 5 árini er verulig gongd komin á. Privatar fyritøkur úr USA, Týskalandi, Japan, satilitt-ríkjunum Hongkong, Taiwan, Singapore o.ø. eru nú sloppin inn á henda stóra og sera áhugaverda marknað at gera íløgur. Stórar íløgur verða gjørdar at kannað mentan til menning.

Hetta hevur við sær, at búskaparframgongdin nú økist, og økist við alt størri ferð. Seinasta hálva árið við yvir 7 prosentum og útlendski íløguvøksturin er øktur við 70%. Ein virðilig kollvelting.

Samstundis sæst, at dugnalig fólk gera innrás á henda áhugaverda marknað. Týðiliga sæst siga kinverskir samfelags- og búskaparfrøðingar - at fólk úr frælsa heiminum, t.d.úr Hongkong, arbeiða millum fjórðing og helvt skjótari enn kinverjin á meginlandinum, tey læra eisini nógv skjótari.

Tílíkt fer ikki bara fram í Kina, men allastaðni, har fólkið sleppir at menna seg og síni evni.

**Privata og almenna brúk hvørt fyri øðrum**

Vit eiga støðugt at gera okkum greitt, at grundarlagið undir einum samfelag er bæði privati og almenni parturin. Eingin tjóð livir eydnusom, uttan hesir partar fylgjast í eini tryggari javnvág.

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi um privatiseringar ella einskiljingar, her eru avgjørdar metingar og sterkar meiningar komnar til sjóndar. - Sjálvandi eru ofta forútinntiknar meiningar sum gera, at eitt kjak kundi verið skilabetri.

Tað kann tykjast løgið, at eitt nú kommunur skulu binda nógvan pening kanska einar 2 til 400 mió. krónur í at eiga SEV. Tað var nátúrligt, tá hetta frambrot varð sett á stovn. At landið skal binda likviditet í ognir sum Fiskavirking, JFK o.a. fyritøkur. Her eiga vit ikki bara at lata standa til.

Í sjeytiárunum var roynt at fáa JFK aftur á privatar hendur, men hetta fekk ikki viðhald frá landsstýrisins síðu. Tílíkt skal gerast dyggiliga umhugsað, væl gjøgnumarbeitt og undirbygt.

**Nógv gott fylgir við**

Tað tykist bæði løgið og harmiligt at hoyra formann Javnaðarfloksins seta málið so óseriøst fram, at koma útlendingar at eiga part í føroyskum fyritøkum, sigur hann niðursetandi, sum honum ofta liggur væl, so kann roknast við, at Frank Uhrenholt og Kjell Inge Røkke, koma inn. Ja, hvat um so er og hevði verðið!

Útlendingar eiga longu í føroyskum fyritøkum, og tað hevur higartil ikki verið stórur trupulleiki Tvørtur ímóti. Her fæst bæði íløgu- og rakstrarkapitalur, nýggjur marknaður við víðfevndum møguleikum, víður sjónarringur, management o.m.a. Sjálvandi verður hetta gjørt við vinningi.

Føroyska samfelagið kann ikki setast aftur um onnur, tí ræðsla er fyri nátúrligari menning.

Eg las greinina hjá Kristinu Háfoss í Dimmalætting fyri nøkrum døgum síðani um einskiljing, og má viðganga, at eg eri samdur við fleiri av hennara borgarligu sjónarmiðum. Spurningurin er bara, hvussu langt hon sleppir, so leingi hon er bundin av Tjóðveldisflokkinum.

**Gott vit hava borgarligt Vinnumálastýri**

Annars havi eg hug til at viðmerkja, hvussu mín góði vinur Tórbjørn Jacobsen fer við nevndar-valinum hjá Bjarna Djurholm. Tórbjørn, hetta er ikki til sóma og tænir ongum endamáli!

Ver fegin um, at Fólkaflokkurin umsitur okkara vinnupolitikk, tí hann er so týdningarmikil. Grundarlagið, sum lagt hevur verið seinastu árini við tilfari og tí hugburði okkara landsstýrismenn, Finnbogi Arge og Bjarni Djurholm, hava greitt úr hondum, er gevandi at byggja víðari á.

Latið okkum standa saman, gera samfelagið uppaftur meiri livandi. Lat fólkið sleppa at royna seg "við teim evnum sum skaparin gav", so vit fáa ein dyggari dynamikk og skapa størri sjálvsvirði.

Búskapar- og samfelagsfrøðingar okkara saman við ávísum politikarum hyggja ofta bert eftir yvirflatuni, teir gera sínar niðurstøður, sum um menniskjan bert er ein deyður maskinlutur og ikki ein livandi, skapandi, hugsandi og mennandi skapningur, tá hon sleppir at royna seg.

Nógv annað verður at taka fram í komandi døgum, nú bæði "búskaparfrágreiðingin" og løgmansrøðan 2002 eru greidd úr hondum og nú verða viðgjørdar, bæði um privatar og almennar útreiðslur og effektivitetin hjá hesum samlaða liði. - Latið okkum hava í huga, at "alment og privat altíð og allastaðni óloysiliga er knýtt hvørt at øðrum".


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507 tel. 333843
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Hugsjónarligt kjak

**Jóannes Eidesgaard heldur, at løgmansrøðan í stórum mun ber brá av at vera byrjanin til eitt nýtt skeið. Tað er tann liberala hugsjónin, sum nú er avgerandi fyri samgonguna, heldur Jóannes, sum væntar, at teir fara at leggja dent á eitt nú einskiljingar í viðgerðini mánadagin**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Mánadagin verður fyrsti regluligi tingfundurin í hesari nýggju tingsetuni. Á dagsskránni verður aðalorðaskifti um løgmansrøðuna á ólavsøku.

– Givið er, at hetta er fyrsta høvið vit fáa til at viðgera samgonguna, sum hon er nú, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

Hann heldur, at løgmansrøðan í stóran mun bar brá av, at hetta var byrjanin til at eitt samgonguskeið.

— Hann setti hol á nøkur ting, samgongan og ætlanirnar sum konsept kundu koma meira til sjóndar, sigur Jóannes Eidesgaard.

Viðgerðin av løgmansrøðuni roknar formaður Javnaðarfloksins fer at at verða merkt av tí meira hugsjónarliga av teirri somu orsøk, at stungið verður út í kortið í løgmansrøðuni.

— Tað eru nógv ting, ið vit løgdu til merkist og eisini ætla okkum at viðgera, men tað var lítið yvirraskandi við røðuni. Har er ríkiligt hjá Javnaðarflokkinum at taka fat í, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann nevnir eitt nú spurningin um einskiljingar, ið hann roknar við, at teir fara at taka hond um í viðgerðini av ólavsøkurøðuni.

Í løgmansrøðuni eggjar løgmaður, Anfinn Kallsberg, eisini til samstarv tvørtur um politisk mørk . Hetta fær kortini ikki Javnaðarflokkin at koma rennandi.

— Næstan allar løgmansrøður hava ein tílíkan appel. Sitandi samgonga hevur tó eitt sindur trupult við at yvirbevísa, at samstarv er teirra vørumerki. Samgongusamráðingarnar vístu, at hann(Anfinn Kallsberg) ynskir eina so smæla samgongu sum gjørligt, sigur Jóannes Eidesgaard.

Breiðar semjur eru kortini nakað, ið Javnaðarflokkurin er áhugaður fyri, men hetta skal so eisini merkja, at flokkurin fær aðra ávirkan enn bert at samtykkja, tá uppskot koma niðan í tingið. Hann nevnir eitt nú pensjónspurningin sum eitt politiskt stórmál, har samstarva átti at verið, men Jóannes Eidesgaard heldur tað vera ógvuliga lítið sannlíkt, tí politiska skipanin í Føroyum ikki er búgvin til breiðar semjur, sum eru púra vanligar aðrastaðni.



*Tað var ikki nógv nýtt undir sólini í løgmansrøðuni á ólavsøku, heldur Jóannes Eidesgaard.Vil Anfinn samstarva við Jóannes, so má Anfinn sjálvur taka sær um reiggj*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Liberalt**

Jóannes Eidesgaard er ikki í iva um, at hendan núverandi samgongan er hamskift í mun til hana, ið vit sóu eftir valið í 1998. Hóast Miðflokkurin er komin uppí, so heldur Eidesgaard talan vera um stórst sæð tað somu samgonguna.

— Hetta er ein samgonga, sum koman saman um fullveldisspurningin í sínari tíð. Nú er hon komin í ein borgarligan búnað, sigur Jóannes Eidesgaard.

— Kósin á sjálvstýrisleið hava bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin boðað frá, at teir í stóran mun taka undir, so tað kann ikki vera tað, ið heldur samgonguni saman, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur meira, at talan er um tann borgarliga partin, tá tosast skal um eindarskapandi partin av samgonguni. Skrivingin í eitt nú tingkvinna Tjóðveldisfloksins, Kristina Háfoss, hevur staðið fyri seinastu tíðina heldur Jóannes Eidesgaard vera meinlíka liberalum fólkaflokssjónarmiðum.

— Tjóðveldisflokkurin líkist Fólkaflokkinum rættiliga nógv á tí liberala økinum, og tað er eisini her, at flokkarnir tykjast at einast, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Einki nýtt

**— Løgmaður hevur dugað sera illa at samstarva við andstøðuna. Felagsstevið mugu teir sjálvir finna, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna Sambandsfloksins**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Forkvinnan í tí størra andstøðuflokkinum, Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen, heldur ikki, at talan var um nakran stórvegis nýggjan boðskap í løgmansrøðuni á ólavsøku.

— Tað er einki nýtt í røðuni hjá løgmanni. Tað mesta er um samgonguskjalið og ætlanir hjá samgonguni, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon dugir í skrivandi stund ikki at siga, hvat teir serliga fara at leggja dent á í viðgerðini av løgmansrøðuni.

— Har vóru eisini nógv gomul mál, ið samgongan ikki hevur megnað at fingið avgreidd. Eitt nú búskapargrunnurin og pensjónirnar koma nú aftur upp at venda, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon vísir á, at tað ikki vóru tey, ið forðaðu fyri búskapargrunninum, men tað er samgongan, sum eigur ábyrgdina av, at hesin grunnurin framvegis letur bíðað eftir sær.

Lisbeth L. Petersen sigur seg eisini hava trupult við at fylgja løgmanni, tá eggjar til og tosar um breitt samstarv.

– Løgmaður hevur dugað sera illa at samstarva við andstøðuna. Vit eru sjálvandi sinnaði fyri samstarvið, um tað gagnar fólkinum, men tað er løgmaður, sum má vísa vegin, sigur Lisbeth L. Petersen.

*Lisbeth L. Petersen vil hava løgmann at taka í egnan barm, um tað skal vera til samstarv millum andstøðu og samgongu.*



Hon leggur afturat, at samgongan í løtuni ikki hevur nakað felgsstev, og hesum mugu teir sjálvir syrgja fyri, áðrenn talan kann gerast um nakað breitt samstarv.

Spurd, svarar Lisbeth, at alt rokið við Tórbjørn Jacobsen og løgmanni hevur sett sín dám á politiska arbeiðið seinastu tíðina, og hon heldur lítið um virðingina fyri arbeiðinumhjá tinginum.

– Virðingin fyri tinginum og løgmansembætinum er fallin munandi, sigur Lisbeth L. Petersen at enda.